Álit

í

løgtingsmáli nr. 19/2020: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um Húsalánsgrunn
(Bústaðir byggja 400 leigu-, luta-, lestrar- og vardar íbúðir kring alt landið)

Kristina Háfoss, Sirið Stenberg, Høgni Hoydal, Beinta Løwe Jacobsen og Hervør Pálsdóttir, løgtingsmenn, hava vegna Tjóðveldi lagt uppskotið fram 9. september 2020, og eftir 1. viðgerð 15. september 2020 er tað beint Trivnaðarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 22. og 29. september og 8. oktober 2020.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við Felagið Peningastovnar, Bústaðir, Útoyggjafelagið, P/f Mark, P/f Toftanes, áhugafelagið Búgva og við landsstýrismannin í almannamálum, Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Uni Rasmussen, Rósa Samuelsen, Erhard Joensen og Jóhan Eli Poulsen) tekur ikki undir við málinum og mælir Løgtinginum frá at samtykkja uppskotið.

Minnilutin (Sirið Stenberg, Hervør Pálsdóttir og Aksel V. Johannesen) vísir á, at fólkatalið er vaksið metnógv seinastu árini, og at tørvurin á bústøðum er stórur, serliga í miðstaðarøkinum, men eisini kring landið.

Minnilutin fegnast um, at talið á teimum, sum vilja seta búgv í Føroyum, er vaksandi, og vísir tí á, at hetta er ein gongd, sum eigur at verða stuðlað politiskt. Verða ikki fleiri bústaðir fingnir til vegar, kann hinvegin væntast, at jaliga gongdin við vaksandi fólkatali steðgar upp ella í ringasta føri, at vit aftur uppliva fráflyting.

Fyri góðum ári síðan legði Tjóðveldi líknandi uppskot fyri Løgtingið, sum tá varð felt við tí grundgeving, at landsstýrismaðurin skuldi fáa frið og stundir at koma í Løgtingið við bústaðarpakkanum hjá landsstýrinum. Nú gott ár seinni er framvegis onki hent og tað undrar minnilutan almikið. Bústaðarneyðin er stór, kanska største avbjóðingin, sum vit hava. Enn hava vit onki sæð til nakran bústaðarpakka. Tað undrar eisini minnilutan, at landsstýrið í so týðandi máli ikki tekur allar flokkar við í at loysa bústaðaravbjóðingina.

Uppskotið gevur Bústøðum heimild til at útskriva lánsbrøv á virði upp til 500 mió. kr. við trygd í føstu ognini. Hetta ger, at byggjast kunnu um 400 fleiri bústaðir kring alt landið. Hetta fer at geva fleiri leigubústaðir, vardar bústaðir, lutabústaðir, lestrarbústaðir og fleiri tøkar bústaðir til bráðtørvslistan, ið er til at hjálpa teimum, ið brádliga standa uttan bústað.

Uppskotið gevur Bústøðum heimild til, at fleiri av bústøðunum hjá Bústøðum gerast lutabústaðir. Heimildin ger, at Bústaðir kunnu selja burtur av bygdu leigubústøðunum, soleiðis at hesir gerast lutabústaðir. Hetta ger, at vit fáa eitt meira fjøltáttað útboð av bústøðum í Føroyum. Hetta ger eisini, at Bústaðir fáa inntøkur frá seldu bústaðarlutunum, ið aftur kunnu nýtast at byggja fleiri bústaðir fyri.

Undanfarna valskeið vórðu nógv átøk framd fyri at betra um umstøðurnar á føroyska bústaðarmarkanaðinum, men tørvur er á enn fleiri átøkum.

Í undanfarna valskeiði vórðu m.a. fylgjandi bústaðarpolitisku lógaruppskot framd:
- Bústaðir fingu heimild til at byggja fyri 250 mió. kr. Hetta svarar til minst 200 bústaðir afturat.
- Skattligi botnfrádrátturin fyri leiguinntøkur varð í tíðaravmarkað tíðarskeið hækkaður upp í 100 tús. kr. árliga fyri at eggja fleiri til at leiga út til langtíðarleigu, heldur enn til stutttíðarleigur og/ella ikki útleiga.
- Leigunevndin fekk heimild at forða fyri órímiligum hækkingum av leigukostnaði.
- Bráðtørvslisti, við tilhoyrandi íbúðum, varð stovnaður. Bráðtørvslistin er ætlaður teimum, ið hava ein bráðfeingis bústaðartørv.
- Almannaverkið fekk heimild at gera avtalur við privat um ávísingarrætt til leigubústaðir.
- 200 mió. kr. vórðu settar av til at byggja nýggjar bústovnar.
- Familjuískoytið varð sett í verk, sum m.a. kann nýtast sum bústaðarískoyti hjá barnafamiljum í trongum fíggjarligum korum.

Eisini stuðlar lógarbroytingin undir at fáa fleiri føroysk lánsbrøv. Harvið er lógaruppskotið ikki bara við til at skapa eitt bústaðarundirstøðukervi men eisini eitt fíggjarligt undirstøðukervi.

Minnilutin kann tí vísa á fleiri góðar orsakir til at samtykkja uppskotið. Fólkavøkstur er ein fortreyt fyri varandi búskaparvøkstri, og minnilutin heldur, at fáa vit ikki gongd á bústaðarbyggingina, so er vandi fyri, at búskaparvøksturin steðgar upp ella minkar.

Umframt atlit til fólkavøkstur og búskap heldur minnilutin, at atlit eisini eigur at verða tikið til trivnað. Fleiri búgva í dag undir umstøðum, sum ikki eru nøktandi. Annaðhvørt trongt inni hjá familju ella í vánaligum bústøðum, til dømis kjallaraíbúðum, fyri ein høgan prís. Minnilutin heldur, at øll skulu hava rætt til at hava ein bústað, sum tey vita, at tey kunnu kalla heim. Har til ber at búgva trygt uttan at stúra fyri heilsuni ella brádliga at standa uttan bústað.

Við hesum viðmerkingum tekur minnilutin undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Trivnaðarnevndin, 29. oktober 2020

Uni Rasmussen
formaður

Sirið Stenberg
næstformaður

Aksel V. Johannesen

Hervør Pálsdóttir

Rósa Samuelsen

Jóhan Eli Poulsen

Erhard Joensen